Tey kunna byrja 1. august

Sjónvarpsstjórin og landsstýrismaðurin í sjónvarpsmálum siga báðir, at tey sjey fólkini, sum eru sett í fyribilsstarv í Sjónvarpi Føroya kunna byrja 1. august.

Ikki neyðugt at gera innstillingar til Landsstýrið, tí talan er ikki um føst størv

Verður ein juridisk/politisk togtvgan um grein 2, stk. 2 í løgtingslógini um sjónvarp?

Alt bendir á tað, eftir at fólkaflokkurin nú er farin at rumbla við fyribilsstørvunum í Sjónvarpi Føroya.

Nú, ein mánað eftir at almannakunngjørt bleiv, hvør hevði fingið fyribilsstarv í Sjónvarpinum, og fýra dagar, áðrenn hesi fólk skula byrja í hesum størvum, er málið komið fram á landsstýrisfundi og á forsíðu Dagblaðsins.

Grein 2, stk. 2 í lógini sigur, at Landsstýrið setir starvsfólk sjónvarpsins eftir tilmæli fyristøðumansins. Hetta er eisini galdandi fyri fyribils starvsfólk, sigur Dagblaðið, uttan tó at nevna, hvaðani blaðið hevur hesa tulking.

Jógvan A. Skaale tulkar ikki lógina soleiðis. Hann sigur, at grein 2, stk. 2 bert er fyri fólk í føstum starvi. Tað er vanligt á almennum arbeiðsplássum, at stovnsleiðarar seta fólk í fyribils, ella leys, størv, uttan at hetta skal fyri Landsstýrið.

Sjónvarpsstjórin sigur, at hann frá Landsstýrinum hevur fingið at vita, at fleiri enn trý føst størv verða ikki sett. Og hesi størv eru sett eftir lógini. Hetta eru størvini hjá sjónvarpsstjóranum, tekniska leiðaranum og skrivstovumanninum.

Kunna byrja

Jógvan A. Skaale og Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður, eru samdir um, at onki er til hindurs fyri, at tey sjey fyribils settu fólkini kunna byrja 1. august.

Torbjørn Poulsen hevur ikki hug at gera viðmerkingar til greinina í Dagblaðnum, sum ikki hevur tosað við hann.

Landsstýrismaðurin sigur, at Landsstýrið hevur góðtikið figgjarætlanina hjá Sjónvarpinum, har m.a. er roknað við átta leysum fólkum.

— Heldur Sjónvarpið hesa figgjarætlan, er onki skeivt í tí, at stjórin ger avtalu við fólk um at hjálpa sær. Bert tá talan er um at seta føst, normerað størv, skal tað fyri Landsstýrið, sigur Torbjørn Poulsen, sum annars ikki vil upplýsa, hvat hendi á alndsstýrisfundinum hósdagin, sum Dagblaðið sipar til.

Nevndarformaðurin misnøgdur

Annfinn Kallsberg váttar, at málið bleiv umrøtt á landsstýrisfundi hósdagin.

Hann sigur, at formaðurin í sjónvarpsnevndini, sum eisini er formaðurin í útvarpsnevndini, hevur gjørt landsstýrið vart við, at eftir hansara meting riggar sambandið millum sjónvarpsnevndina og Sjónvarpið ikki á sama hátt sum sambandið millum útvarpsnevndina og Útvarpið. Eftir hesum at døma er ikki uttan grund at halda, at sjónvarpsstjórin er farin út um heimildir sínar, tá hann hevur sett tey sjey fólkini.

Annfinn Kallsberg sigur, at landsstýrið, fyri at fáa greiðu á hesum, hevur biðið Torbjørn Poulsen koma við einari frágreiðing um Sjónvarp Føroya.

hd

Dýrandi fullir

Tann, sum koyrdi annan bilin, var dýrandi skitfullur og tað sama kann sigast um hinar báðar í bilinum, upplýsti vakthavandi á politistoðini í Runavík í gjár.

Minst fýra fólk blivu flutt á Landssjúkrahúsið eftir eitt álvarsligt ferðsluóhapp tíðliga hóskvøldið á vegnum frá Skipanesi niðan á Gøtueið.

Tveir persónbilar stoyttu saman. Politiið heldur, at teir triggir menninir í øðrum bilinum helst hava verið í Leirvík og loyst út, tí bilurin var fullur av øli. Allir triggir blivu fluttir á Landssjúkrahúsið og tann eini bleiv innlagdur.

Í hinum bilinum vóru tvær kvinnur og tvær gentur. Onnur gentan, 12 ára gomul, skarst illa í andlitið og bleiv hon flutt á Landssjúkrahúsið.

15 ára gamal í stolnum bili

Friggjanáttina tók politiið í Havn ein 15 ára gamlan drong, sum koyrdi í einum stolnum bili.

Drongurin var ikki edrúur, men hann hevði tó ikki elvt til nakran skaða við koyring sínari, upplýsir politiið.

Eisini politiið hevur seinastu tíðina merkt, at ólavsøkan hevur verið í nánd. Hvørja nátt hava full fólk verið inni at sova rúsin út, ofta hevur verið fult hús. Teir kunna hava fýra inni í senn.

Á ólavsøku vera teir minst 12 á hvørjari vakt. Vanliga eru teir fýra um vikuskifti.

Ongin í neyð

Fríggjadagin í síðstu viku fóru Tjaldrið og Mallemukken út at leita, tí ein neyðrakett var sædd yvir Nólsoyarfirði.

Tá skipini høvdu leitað í tveir tímar, bleiv alt avblást. Tað var tá greitt, at neyðrakettin var send av landi, onkrastaðni í nánd við skipasmiðjuna.

Politiið hevur ongan tikið í hesum sambandi.

Flaghús í Íslandi

Fornminnissavnið hevur hesa ólavsøkuna eina íslendska framsýning, Torfbærinn, frá eldaskála til burstabæ.

Hetta er framsýning um flaghús í Íslandi, sum þjóðminjasafnið í Reykjavík hevur gjørt.

Framsýningin er í Norðurlandahúsinum.

Annars hevur Fornminnissavnið gjørt eina framsýning í ár. Hon er um føroyskt heimavirki, men egnar seg betur at hava uttanlands. Hon hevur júst verið í Noregi.

Til sølu:

Tað nýggjasta í føroyskari list

Nógv spennandi er at siggja á ólavsøkuframsýningini. M. a. hevur Palle Gregoriussen, arkitektur, nakrar tekningar.

Og Elinborg Lützen er aftur farin at mála oljumálningar. Hon hevur tveir á framsýningini

Tað er ikki tí Norðurlandahúsið er betur egnað enn Listaskálin, at ólavsøkuframsýningin hjá Listafelagnum aftur í ár verður í Norðurlandahúsinum.

Tað er fyri at sleppa undan at taka niður føstu framsýningina í Listaskálanum. Hetta er framsýningin, sum skal sýna føroyska list. Serliga útlendingar eru áhugaðir fyri hesi framsýning og tí er spell at noyðast at taka hana niður í vikur, meðan ólavsøkuframsýningin er. Tí just hesa tíðina eru nógv fremmandafólk í Havn.

Ólavsøkuframsýningin letur upp í dag kl. 14.00. Hon er opin í dag, í morgin og mánadagin og so aftur sunnudagin 5. august kl. 14.00 — 18.00. Annars er hon opin, tá Norðurlandahúsið er opið, hvønn dag í næstu viku frá kl. 10.00. Mikudagin er opið til kl. 20.00, leygardagin til kl. 16.00 og hinar dagarnar til kl. 17.00.

Eins og vant eru á ólavsøkuframsýningini verk hjá kendum og ókendum listafólkum, fólkum, sum ikki enn hava sligið navn sítt fast. Onkrir útlendingar, sum búgva í Føroyum í løtuni, eru við, so sum Ole Wich og Philippe Carré.

Hinvegin eru onkur kend føroysk nøvn ikki við, eitt nú Ingálvur av Reyni, Fridtjof Joensen og Eyvindur Mohr.

Á framsýningini er eisini, sum ofta fyrr, arkitekturur. Tað er modellið av íðnaðardeplinum á Sundi, sum Albert Isfeld og Gudmund S. Hansen hava teknað til Hans Mortensen.


Í fjør vóru nógv fólk á ólavsøkuframsýningini. Í hvussu so er yvir 2.000, tí 2.000 sýningarskráir vóru prentaðar og tær blivu uppi.

Sýningarskráin er annars eisini í ár lutaseðil. Tann, sum vinnur, kann velja sær listaverk fyri 4.000 kr. frá onkrum luttakara á sýningini.

hd

Listaskálin eisini opin

Listaskálin hevur eisini opið á ólavsøku. Har er opið teir báðar dagarnar og mánadagin kl. 14,00—18,00.



Nakað heilt fyri seg er hesin skulptururin hjá Eli Smith. Tá tendrað verður á kassanum fer skulptururin at mala og spæla tónleik.

Tað sæst ikki væl á myndini, men tað eru tveir gummihandskar, sum halda uppi ovasta partinum